# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Deildarleiðari til Skurðgongina

Eitt fulltíðarstarv sum deildarleiðari á Skurðgongini, primert í dagvakt, er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt og 1 ár fram við møguleika fyri leingjan.

Á deildini verða árliga framdar uml. 3800 viðgerðir innan tær ymsu sergreinirnar. Deildin fevnir eisini um sterilsentraløkið og skopieindina.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
Deildin er skipað við einum deildarleiðara og tveimum ábyrgdarhavandi sjúkrarøktarfrøðingum. Deildarleiðarin skal standa fyri tí dagligu leiðsluni á deildini, tryggja góðskuna av sjúkrarøktini, starvsfólkamenning og hava ábyrgdina av fíggjarstøðuni á deildini. Deildarleiðarin hevur innan sjúkrarøktarfakliga økið tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á Skurðdeplinum. Næsti fyrisetti er depilsleiðslan á Skurðdeplinum. Deildarleiðarin skal tryggja, at deildin virkar eftir virðisgrundarlagnum hjá Landssjúkrahúsinum og hava neyvt samstarv við nógvar ymiskar fakbólkar og deildir.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- ávirkan á fakliga menning

**Vit ynskja, at tú ert áhugað/ur í at**
- menna sjúkrarøktina, saman við kompetentum starvsfólkum
- skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi, sjúkrarøktarfakliga og tvørfakliga
- tryggja góða upplæring av nýggjum starvsfólki
- seta í verk fakliga menning og útbúgving av røktarstarvsfólki
- verða við til at implementera THS (talgilda heilsuskipan)

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligar royndir og áhuga innan arbeiðið á skurðgong
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- hevur leiðslu royndir og ynski um at fara undir leiðsluútbúgving
- áhuga í fakligari menning av røktarstarvsfólkum
- kann arbeiða sjálvstøðugt, kreativt og hava visiónir
- telduførleiki á brúkarastøði

**Leiðsluútbúgving er ein fyrimunur**

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmálanum millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Tórhild Bærentsen, virkandi deildarleiðara, lokal 5211 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102 ella t-post naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 29. januar 2007 kl. 12.00

## Deildarleiðari til Bráðdeildina G1

Eitt fulltíðarstarv sum deildarleiðari á Bráðdeildini er leyst at søkja til setan 1. mars 2007.

Brádeildin heldur til í nýggja bygninginum, har pláss er fyri 5 intensivum sjúklingum, 5 í viðrakningin, 5 í dagskurðstovu, umframt bráðfeingismóttøku/skaðastovu, sum er undir dagligu leiðsluni av deildarleiðaranum. Harafturat kemur kommunulæknavaktin at virka í økinum um stutta tíð. Møguligar broytingar kunna verða í deildarleiðara ábyrgdarøkinum í samband við ætlaða umskipan av arbeiðsøkjum á deplinum.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
At standa fyri tí dagligu leiðsluni á deildini, tryggja góðskuna av sjúkrarøktini, starvsfólkamenning og hava ábyrgdina av fíggjarstøðuni. Deildarleiðarin hevur innan sjúkrarøktarfakliga økið tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á Bráðdeplinum. Næsti fyrisetti er depilsleiðslan á Bráðdeplinum.

Deildarleiðarin skal tryggja, at deildin virkar eftir virðisgrundarlagnum hjá Landssjúkrahúsinum og hava neyvt samstarv við nógvar ymiskar fakbólkar og deildir.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning

**Vit ynskja at tú ert áhugað/ur í at**
- menna sjúkrarøktina, saman við kompetentum starvsfólkum
- virka fyri einum góðum arbeiðsumhvørvi, sjúkrarøktarfakliga og tvørfakliga
- skipa fyri góðari upplæring av nýggjum starvsfólki
- skipa fyri fakligari menning og útbúgving av røktarstarvsfólki
- verða við til at implementera THS (talgilda heilsuskipan)

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligar royndir/e.v.t kliniska útbúgving og áhuga innan omanfyri nevndu øki
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- hevur leiðsluroyndir og ynski um at fara undir leiðsluútbúgving
- áhuga í fakligari menning av røktarstarvsfólkum
- kann arbeiða sjálvstøðugt, kreativt og hava visiónir
- telduførleiki á brúkarastøði

**Leiðsluútbúgving er ein fyrimunur**

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Margit Stórá, deildarleiðari G1, lokal 5811 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102 e-post naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 29 januar 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar ella heilsurøktarar/pleygarar til Psyk.

Á Deild 1 er eitt fast starv á starvsbrøki 0,6 leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.
Á Deild 3 eru tvey farloyvisstørv á starvsbrøki 0,5 leys at søkja til setan skjótast gjørligt og árið út.

Deild 1 er ein opin 5 daga psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Arbeiðið er skipað eftir kontaktpersónsskipanini, og vit raðfesta samstarv, trivnað og fakliga menning høgt.

Deild 3 er ein opin psykiatrisk viðgerðardeild, ið er í støðugari menning. Har starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar.

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- prógv sum heilsurøktari/pleygari
- royndir og fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- góða innleiðslu
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmála við Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Jóngerð M. Nielsen, deildarleiðari á Deild 1, lokal 4021, t-post jomani@lsh.fo Elsebeth Sørensen, deildarleiðari á Deild 3, lokal 4003 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur á Psykiatriska deplinum, lokal 4102, t-post bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 29. januar 2007 kl. 12.00

## Læknaskrivari/leiðandi læknaskrivari til Psyk.

Á Psykiatriska deplinum er eitt fulltíðarstarv sum læknaskrivari/leiðandi læknaskrivari leyst at søkja til setan 1. mars 2007 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- kt-førleiki

**Eyka førleikakrøv til leiðandi læknaskrivara**
- leiðslu og menningarhugað
- leiðsluútbúgving og royndir er ein fyrimunur
- hevur evni at raðfesta og ætlanargera arbeiðið

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Tormóð Stórá, depilsleiðara, lokal 4100, t-post tost@lsh.fo ella til Jórun Arge, leiðsluskrivara, lokal 4103, t-post joruna@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 29. januar 2007 kl. 12.00

## Onnur størv

**Læknaskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 19. januar 2007, kl. 12.00
Sí meira á www.lsh.fo

**Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar**
Umsóknarfreistin er 22. januar 2007, kl. 12.00
Sí meira á www.lsh.fo

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1**
Umsóknarfreistin er 22. januar 2007 kl. 12.00
Sí meira á www.lsh.fo

Tumsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingjaplássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo